



**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 400 krónur ársfjórðingin

Samstundis eri eg við í lutakastinum um eina ferð frá

ATLANTIC AIRWAYS

Navn ____________________

Bústaður ____________________

Býur/bygd ____________________

Tel ____________________

e-mail ____________________





# Konfirmatións-klæðir til hansara



*fáast í*

**Kallkyn** Vágsbotnur Tel. 31 62 06





**HONDA**

- Streymgeneratorar
- Vatnpumpur
- Grund/Dykkpumpur
- Sláimaskinur
- Bátamotorar

Kaj Andreasen & Co

Sosialurin - 311820



Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo


Kirkjubøar kommuna sóknast eftir

# pedagogi / hjálparfólki

## til Barnagarðin á Velbastað

Søkt verður eftir einum pedagogi / hjálparfólki at arbeiða á stovu við seytjan børnum í aldrinum 3 1/2 - 8 ár, at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er 25-30 tímar um vikuna.

Eisini verður søkt eftir avloysara at heita á undir sjúku og feriu. Viðkomandi kann rokna við, inn ímillum, at hava nógvar frídagar.

Í Barnagarðinum eru 40 børn millum 1/2 og 8 ár.

***Vit vænta, at viðkomandi:***

- dámar væl at vera úti og sær møguleikar og avbjóðingar í náttúruni
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og torir at tosa um forðingar
- vil vera við til at seta sín dám á stovnin

Løn og arbeiðsviðurskifti eftir sáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

***Umsókn***

Umsókn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 30.09.02

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnagarðin á Tel 32 81 21 og spyrja eftir Hannu ella Elsu.

**KIRKJUBØAR KOMMUNA**

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

# Sjúkrasystir til D5

Av tí, at ov fáar umsóknir komu inn til starvið á deild 5, verður starvið lýst av nýggjum. Talan er um

- sjúkrasystir 0,8 tíð frá 15 nov 2002 til 15 juli 2003. Um eingin sjúkrasystir søkir, kunnu almanna- og heilsuatstøðingar við lokalum medisin prógvi søkja. Um eingin av omanfyri nevndu søkir, kunnu pleygarar og almanna-og heilsuatstøðingar eisini søkja

Deildin er ein deild til stutt- og langtíðarviðgerð.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir, pleygari ella almanna- og heilsuatstøðingur
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 31 35 40, Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir, lokal 351 - e-post: bergitw@ahs.fo ella til Liss Jakobsen, deildarsjúkrasystir D5, lokal 425.

Umsóknarfreistin er 3. oktober 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Chevrolet Camaro, 3 hurðar
**Árg.:** 1990
**Typa:** 98.253

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
e-mail: mpe@trygging.fo
Beinl. tlf. 34 57 28
fax nr. 34 56 07
at hitta mánadag-hósdag millum 08.30-10.00
og fríggjadag kl. 08.30-16.00

# Keyp av seyðaskinnum

Aftur í ár keypa vit seyðaskinn, prísurin er ikki endaligur, men kemur væntandi at liggja á sama støði sum seinasta ár.

Hagreiðing skal verða eftir forskriftunum, og skulu skinnini m.a. kølast beinanvegin.

Vit taka bæði ímóti feskum og saltaðum skinnum.

Bert væl hagreidd lambsskinn fáa góðan prís, meðan ær-, veðra-, og 2. flokks lambsskinn fáa minni prís.

Pesjur verða ikki keyptar.

Skinnini skulu latast til: **MBM-Fóður í Kollafirði, telefon 479035.**

Forskriftir um hagreiðing av seyðaskinnum kunnu fáast við at venda sær til MBM á telefon 479000.

MBM **Kollafjørður 13-09-2002**

# Leyst starv

Starvið sum happadráttarseljari á Tvøroyri er leyst at søkja.

Setanin er galdandi frá 1. januar 2003 at rokna.

Skrivlig umsókn verður at senda nevndini fyri happadráttin í seinasta lagi tann 07. oktober 2002.

**Nevndin fyri**
**Hin Føroyska Happadráttin**
**Gundadalsvegur 27**
**100 Tórshavn**

# Montørur søkist

til at montera garaguhurðar, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða arbeiðssamur og álítandi.

Ring og hoyr nærri.

**Tlf. 317686 eftir kl. 16.00 ella tlf 217686**